VINNUSÍÐURNAR

BLAÐIÐ við føroysku VINNU tíðindunum

**Landsstýrismaðurin við vinnumálum vil umleggja Postverkið til eitt partafelag, sum tað almenna eigur, men løgtingsmaður heldur, at posturin eins væl kann fara á privatar hendur**



*Nú verður ein nýggj roynd gjørt at umleggja Postverk Føroya, so at tað í framtíðini verður tikið sum eitt partafelag, ið tað almenna eigur. Løgtingsmaður heldur tó, at einki hevur seinastu árini prógvað, at tað almenna er best ført fyri at hava postflutningin um hendi*

# Postur til tey privatu

POSTVERKIÐ

*Eyðun Klakstein*
*eydun@sosialurin.fo*

Tað er einki, sum seinastu árini hevur víst, at tað almenna er betur ført fyri at reka postvirksemi, enn tað privata er.

Tað heldur løgtingsmaðurin Torbjørn Jacobsen, sum í løgtinginum hevur gjørt vart vit hetta sjónarmið, nú uppskot er lagt fram um at umskipa Posterkið til partafelag.

– Hetta verður ikki gjørt eftir einum degi, og eg taki undir við, at Postverkið í fyrstu syftu verður eitt partafelag, sum tað almenna eigur, men eg taki eisini undir við, at arbeitt verður víðari fram ímóti, at føroyskt postvirksemi kann loysast frá tí almenna og seljast privatum, sigur Torbjørn Jacobsen.

– Hví skal tað almenna endiliga hava postin um hendi? Hetta er ein púra vanlig tænasta, og tað er ikki avgerandi, at tað almenna skal reka hana, heldur tingmaðurin.

## Postur til partafelag

Tað hevur verið fleiri ferðir roynt at umleggja Postverk Føroya til partafelag. Fyrsta royndin varð gjørd longu í 1998, men uppskotið datt burtur í sambandi við, at løgtingsval varð útskrivað.

Í ár 2000 varð nýtt uppskot fyrireikað, og samráðingar vóru millum landið og Postfelagið, men partarnir samdust ikki um innihaldið í einari avtalu um starvsfólkaviðurskiftini.

Tá løgtingslógaruppskot um postvirksemi skuldi leggjast fram í løgtinginum í august 2002, gjørdi landsstýrið av ikki at leggja fram lógaruppskotið um at umskipa Postverk Føroya til partafelag.

Vinnumálaráðið fyrireikar nú lógaruppskot um at umleggja Postverk Føroya til partafelag, sum ætlandi verður lagt fyri Løgtingið í hesi tingsetuni.

Síðst í oktober mánaði legði Bjarni Djurholm, landsstýrismaður, uppskot fyri løgtingið, har hann biður um heimild at stovna eitt partafelag, sum skal reka postvirksemi í Føroyum.

Hetta uppskot hevur verið til viðgerðar í løgtinginum, og undirtøka tykist vera fyri tí.

## Uppskot um lítið og einki

Tað er eitt sera stuttorðað uppskot, sum løgtingið skal viðgera um postvirksemið. Tað snýr seg bara um, at landsstýrismaðurin fær heimild at stovna partafelag, hvørs endamál skal vera at reka postvirksemi og aðra vinnu, sum hevur samband við hetta virksemi.

Landið skal eiga partabrøvini nýggja partafelagnum við rubb og stubb, og Postverkið fær ikki loyvi at leggja saman við øðrum ella fara við í samstarv, sum við sær, at onnur enn landið gerast eigarar.

Út frá hesum skal landsstýrismaðurin síðani gera endaliga uppskotið liðugt og leggja tað fyri løgtingið aftur. Tá skal øll umleggingin lýsast nærri. Fíggjarlig heimild er fingin til vega at stovan partafelag, og løgtingið hevur játtað at seta í mesta lagi 30 milliónir krónur í nýggja partafelagið.

## Meiriluti setir freist á

Ein meiriluti í vinnunevndini hjá løgtinginum hevur skrivað álit í málinum, og har verður sagt, at skal tað umsíðir eydnast at umleggja Postverkið, er tað neyðugt, at allir partar í málinum verða tiknir við upp á ráð.

– Politiskt skal mann kenna seg tryggan fyri, at postflutningur eisini í framtíðini verður á høgum støði um alt landið, sigur meirilutin í sínum áliti.

Bjarni Djurholm hevur í sínum uppskoti onga ítøkiliga tíðarfreist fyri, nær endaliga uppskotið um postin skal leggjast fyri løgtingið, men vinnunevndin mælir í einum broytingaruppskoti til, at ein freist verður sett á, so at Bjarni Djurholm skal møta aftur í tinginum við endaligum uppskoti í hesari tingsetuni.

## Tobbi við sínum egna

Torbjørn Jacobsen hevur gjørt sítt egna álit í vinnunevndini, og hann tekur eisini undir við, at postvirksemi verður lagt í eitt partafelag. Men hann hugsar tankan longur enn bara til eitt partafelag, sum tað almenna eigur.

– So leingi partafelagið er alment er vandi fyri, at trupulleikin við vardum sektorum í postvirkseminum ikki loysna og verða bryndir av kappingarelementinum, heldur Torbjørn Jacobsen, sum vil hava, at tað verður arbeitt fram ímóti einum privat riknum postpartafelag.

– Dentur skal tó leggjast á, at líkamikið hvat, ið hendir annars í eigarviðurskiftunum, so skal ein almenn konsessión altíð tryggja, at allir borgarar, sama um teir búgva í Hattarvík ella í miðbýnum í Tórshavn, standa eins mótvegis serviseringini, sum postvirksemið í Føroyum skal veita, sigur hann.

Broytingaruppskotið frá meirilutanum fekk undirtøku í løgtinginum og fer samtykt til triðju viðgerð.

## Postverkið

PostverkiðTá ið postvirksemi í 1976 kom á føroyskar hendur, fekk hesin nýggi almenni stovnur heitið Postverk Føroya.

Í dag starvast um 290 fólk í Postverkinum, og tað svarar til umleið 240 ársverk.

34 posthús eru kring landið, og umleið 90 postboð bera postin út. Av hesum eru 20 avgreiðslupostboð, ið afturat sjálvari postútberingini eisini veita beinleiðis kundaavgreiðslu.

Postverkið er skipað í fýra høvuðsdeildir – Sendingar, Avgreiðsla, Frakt og Frímerki. Harumframt eru í postverkinum Búskapardeild, KT-deild, Umsitingardeild og Marknaðardeild.

Seinastu árini er stór arbeiðsorka løgd í at miðsavna postvirksemið í bygningin á Óðinshædd 2 í Havn, og her er nú hjartað í allari postviðgerðini. Alt – brøv, pakkar og farmur – fer haðani, og umsitingin heldur eisini til har.